Fylgiskjal 5b

LM-057/2022

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
110 Tórshavn

2023 01 26 - FMR høyring KVSL
Tórshavn, hin 26. januar 2023

Viðvíkjandi uppskoti um broyting í løgtingslógini um skatting av kapitalvinningi (ískoyti)

Umframt viðmerkingarnar, sum vit sendu hin 25. januar 2023, hava vit niðafyri standandi viðmerking.

Viðvíkjandi grein 21, stk. 1 – **Upplýsingar hjá triðjamanni**
Uppskotið inniheldur eina víðkaða skyldu hjá triðjamanni at útlevera allar upplýsingar, sum kunnu vera viðkomandi fyri TAKS. Tað verður ikki nágreinað í viðmerkingunum, hvussu víttfevnandi henda skylda er.

Skattalógin inniheldur tilsvarandi heimild í § 119, stk. 1, men har er skyldan avmarkað til roknskapartilfarð við tilhoyrandi skjølum.

Sum vit duga at siggja í danskari lóggávu, sí Skattekontrolloven § 53, stk. 2, so er skylda hjá triðjamanni at útlevera upplýsingar avmarkað til roknskapartilfarð v.m., tvs. líka sum § 119, stk. 2 í føroysku skattalógini.

Vit mæla í fyrsta lagi til, at orðingin verður gjørd einsljóðandi sum samsvarandi orðing í skattalógini, og í øðrum lagi hevði verið ynskiligt at fingið lýst, um og í hvønn mun hetta er ein víðkan av upplýsingarskyldu hjá triðjamanni í mun til núverandi reglu í § 119, stk. 2 í skattalógini, vísandi til at orðingin tykist breiðari.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Jóhannes Færø formaður	Olaf Frits Joensen næstformaður	Fróði Sivertsen peningarøkil	Alvi Nielsen skrivari